# Dagrøktarsáttmáli

# millum

# Starvsfelagið

# og

# Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# 2021 - 2024

# Innihaldsyvirlit


**1. Kapittul Alment** ... 1

§ 1 Sáttmálaøki og samráðingarrættur ... 1

§ 2 Álitisfólk og nevndarlimir ... 1

§ 3 Setan ... 2

§ 4 Uppsøgn ... 2

§ 5 sjúka ... 3

§ 6 Barnsferð ... 4

§ 7 Eftirsitiløn ... 4

§ 8 Frítíð ... 4

§ 9 Tænastuferðir og koyripeningur ... 4

§ 10 Aðrar skipanartreytir ... 5

§ 11 Onnur viðurskifti ... 5

§ 12 Serligar avtalur ... 5

**2. Kapittul. Arbeiðstíð og løn** ... 5

§ 13 Arbeiðstíð ... 5

§ 14 løn ... 5

§ 15 Gestarøkt ... 6

§ 16 Børn við serligum tørvi ... 7

§ 17 Legugjald ... 7

§ 18 Yvirarbeiði ... 7

§ 19 Fastir frídagar ... 7

§ 20 Gjald ella avspákan ... 7

§ 21 Samsýning fyri skeiðluttøku ... 7

§ 22 Frí við ongari løn ... 8

§ 23 Gildi sáttmálans ... 8

# 1. Kapittul Alment

**§ 1 Sáttmálaøki og samráðingarrættur**

Stk. 1. Hesin sáttmáli fevnir um dagrøktarar í kommunalari tænastu, sum eru ikki tænastumenn ella nú verða lønt eftir øðrum lønarskipanum.

Stk. 2. Í sáttmálaskeiðinum mugu ikki verða gjørdir aðrir lønarsáttmálar um tey arbeiðsøki, ið hesin sáttmálin umfatar, uttan at semja fyrst er fingin um hetta millum Starvsfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Stk. 3. Viðvíkjandi samráðingarrættinum verður víst til løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn við møguligum seinri broytingum.

Stk. 4. Er sáttmálin uppsagdur, og semja ikki kemur í lag partanna millum, ella annar parturin ber seg undan tingingum, hevur hvør av pørtunum rætt til at fáa tingingarnar framdar við at semingsstovnurin leggur uppí.

Stk. 5. Øll ivamál um tulking av sáttmálanum skulu leggjast fyri fasta gerðarrættin.

**§ 2 Álitisfólk og nevndarlimir**

Stk. 1.Tá tað í einari kommunu eru í minsta lagi 5 dagrøktarar, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, hava hesir rætt at velja eitt álitisfólk. Tá ein verður valdur til álitisfólk, fær ein samsýning svarandi til eitt lønarstig.
Álitisfólk og nevndarlimir kunna ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið.

Stk. 2. Til álitisfólk kann bara veljast tann, ið hevur fulltíðarstarv og hevur arbeitt sum dagrøktari í kommununi í minsta lagi í 1 ár, uttan so at tað av serligum umstøðum gerst neyðugt at víkja frá hesum.

Stk. 3. Valið hevur ikki gildi, fyrr enn Starvsfelagið hevur góðkent tað og boðað avvarðandi kommunu frá valinum. Hendan fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

Stk. 4. Álitisfólk hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir o.a., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði millum limir og kommunur.

Stk. 5. Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við dagrøktarleiðaran ella kommununa um øll mál, sum hava týdning fyri dagrøktaran og kommununa. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, skal tað leggja málið fyri felagið.
Stk. 6. Tá ið talan er um siga upp dagrøktara, skal kommunan samráðast við álitisfólkið í avvarðandi kommunu. Verða partarnir ikki samdir, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.

Stk. 7. Álitisfólkið skal í samráð við kommununa í arbeiðstíðini hava møguleika at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgunum ella arbeiðsviðurskiftunum á staðnum, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt.

Stk.8. Um dagrøktari er valdur í nevnd felagsins, skal honum verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemjum. Harumframt fáa nevndarlimir frí við løn 1 dag um mánaðin til felagsarbeiði.

Stk.9. Virkandi formaður í felagnum hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur kommunan skyldu at hava starv til dagrøktaran, tá ið formanstíðin er úti.

Stk. 10. Tá ið álitisfólk og dagrøktarar søkja um at sleppa á álitisfólkaskeið, fer kommunan at viðgera slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndarlimir í felagnum.

Protokollat viðv. reglugerð fyri álitisfólk
Partarnir eru samdir um, at álitisfólk skulu hava rætt til at koma saman til felagsfund 2 ferðir um árið í arbeiðstíðini.

**§ 3 Setan**
Stk. 1. Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys í kommununi og alment. Tó er ikki neyðugt at lýsa starv leyst, um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir. Tilskilast skal, hvat starvið umfatar, og hvørjum sáttmála og lønarflokki starvið verður lønt eftir.

Stk. 2. Tá ið starvið er sett, skal hann, ið starvið hevur fingið, í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fáa setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

1. Navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
2. nær setanin tekur við,
3. galdandi sáttmáli millum omanfyrinevndu partar at ganga eftir,
4. starvsheiti,
5. bólking,
6. eftirlønargjald,
7. starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og tí setta,
9. arbeiðstíð,
10. frítíð við løn og frítíðarískoyti,
11. setanarøki,
12. arbeiðsstaður/staðir.

Stk. 3. Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Starvsmannafelagnum.
Stk. 4. Limagjaldið til Starvsfelagið kann verða frádrigið í lønarútgjaldingini.

**§ 4 Uppsøgn**
Stk. 1. Fyri dagrøktarar, sum eru settir í starv eftir hesum sáttmála, er uppsagnarfreistin – tá ið ikki onnur semja er – frá arbeiðsgevarans síðu hendan:
1 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá ið viðkomandi hevur verið í starvi í 6 mánaðir.
3 mánaða uppsagnarfreist frá einum 1. í mánaðinum at rokna, tá ið viðkomandi hevur verið í starvi í meira enn 6 mánaðir.

Uppsagnarfreistin verður hækkað við einum mánaði fyri hvørji 3 ár, viðkomandi hevur verið í starvi, tó hægst 6 mánaðir.
Uppsagnartíðin hjá álitisfólki, sum eru vald til álitisfólk, verður longd soleiðis, at 3 mánaðir verða lagdir afturat uppsagnartíðini, sum hvørt einstakt álitisfólk hevur innvunnið.

Stk. 2. Tá ið dagrøktari sigur upp, er uppsagnarfreistin – um annað ikki er avtalað – 1 mánað frá einum 1. í mánaðinum at rokna.

Stk. 3. Uppsøgn eftir hesum reglum skal verða skrivlig og latin inn ikki seinni enn hin síðsta í mánaðinum frammanundan uppsagnartíðini.

Stk. 4. Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólki úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og starvsfólkinum til ummælis við minst 14 daga freist. Inniheldur ætlanarskrivið eymar upplýsingar sambært § 27 í fyrisitingarlógini, verður ein fráboðan send Starvsmannafelagnum um, at eitt ætlanarskriv av hesum slag verður sent starvsfólkinum, samstundis sum tað verður sent starvsfólkinum.

Stk. 5. Verður dagrøktari sagdur at fara úr starvi, og er orsøkin eftir felagsins metan ógrundað, tá eiga Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið at taka málið til samráðingar og avgerðar millum sín.

> *Protokollat viðv. § 4:*
> *Um so er, at dagrøktari eftir kommununnar meting ikki røkir tænastuskyldur sínar, eigur dagrøktarin í fyrstu syftu at fáa eina munnliga ávaring. Tá ið ávaring verður kunngjørd, skal álitisfólkið á staðnum vera hjástatt. Eftir hesa munnligu ávaring hevur viðkomandi rætt til at fáa at vita orsøkina til ávaringina og fær frá tí tíðarskeiði eina freist, áðrenn ein skrivlig ávaring kann verða givin viðkomandi og send felagnum við nágreiniligari grundgeving.*
> *Tá ið uppsøgn verður givin skal hon sendast viðkomandi skrivliga.*
> *Reglan í hesum protokollati er ikki galdandi, um ein dagrøktari hevur framt grovt misbrot í tænastuni.*
> *Áðrenn uppsøgn uttan ávaring verður givin, skal kommunan senda felagnum fráboðan.*

**§ 5 sjúka**
Stk. 1. Verður dagrøktari orsakað av sjúku ikki førur fyri at røkja arbeiði sítt, verður hetta mett sum lóglig orsøk til forfall, uttan so at viðkomandi, sum er í starvi eftir hesum sáttmála, av fyrisettum ráði ella grovum ósketni hevur verið atvoldin til sjúkuna, ella, tá ið hann er settur í starvið, hevur dult sjúkuna.

Stk. 2. Fráveru vegna sjúku verður dagrøktari eftir áheitan at vátta skrivliga og við læknaváttan, um tað verður kravt. Varir sjúkan meira enn 2 vikur, kann tað verða kravt, at dagrøktarin útvegar gjøllari upplýsing frá lækna um, hvussu drúgv sjúkan ætlandi verður. Slíka læknaváttan rindar arbeiðsgevarin.

Stk. 3. Starvsfólk kunnu fáa frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar árliga. Hava tey meira enn 2 børn undir 10 ár, kunnu

tey fáa frí upp til 20 dagar. Somu reglur eru galdandi fyri tímalønt starvsfólk, sett í starv eftir hesum sáttmála. Sí fylgiskjal um avtalu um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á kommunalum/interkommunalum arbeiðsplássum, pkt. 4.

**§ 6 Barnsferð**
Stk. 1. Dagrøktari, ið er við barn, eigur at siga arbeiðsgevaranum frá, 3 mánaðir áðrenn hon væntar seg at eiga. Ger hon ikki tað, hevur arbeiðsgevarin rætt til at siga henni upp frá tí degi, hon gerst óarbeiðsfør.

**§ 7 Eftirsitiløn**
Stk. 1. Tá ið dagrøktari, ið er løntur eftir hesum sáttmála, doyr, meðan hann er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi/samlivandi ella børn undir 18 ár, sum hann hevur skyldu til at uppihalda, rætt til løn samsvarandi uppsagnartíðini, minst 3 mánaðir, tó hægst 6 mánaðir.

Stk. 2. Eftirsitiløn er tann løn, viðkomandi hevði. Lønin í mánaðinum, tá ið dagrøktarin doyði, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

**§ 8 Frítíð**
Stk. 1. Frítíð eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.

Stk. 2. Frítíðarlønin er miðallønin í undanfarna innvinningarári. Haraftrat verður veitt frítíðarískoyti, sum er 1,5% av lønini í sama tíðarskeiði.

Stk. 3. Harumframt eiga dagrøktarar rætt til serstakt frítíðargjald, sum er 12% av útgoldnari yvirtíðarløn í undanfarna innvinningarári.

Stk.4. Sjúkradagar í frítíð verða vanliga viðroknaðir sum frídagar. Tó kunnu eftir umsókn í serligum førum, har sjúka forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og nýggir frídagar verða tá givnir. Um dagrøktari er óarbeiðsførur, tá ið frítíðin byrjar, verða tó altíð latnir eyka frítíðardagar. Somu reglur verða galdandi í samband við sjúku undir avspákan.

Stk. 5. Arbeiðsgevarin ásetur, nær frítíðin skal verða. Arbeiðsgevarin skal, so vítt arbeiðsumstøðurnar loyva tí, ganga ynskjum dagrøktarans um, nær frítíðin hjá tí einstaka skal vera, á møti. Arbeiðsgevarin skal í so góðari tíð sum gjørligt siga dagrøktaranum frá hesum, tó í seinasta lagi 1 mánað, áðrenn frítíðin byrjar, uttan so at serligar umstøður forða fyri hesum.

**§ 9 Tænastuferðir og koyripeningur**
Stk. 1. Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verða sum fyri tænastumenn landsins ella eftir serligari avtalu.

Stk. 2. Ferðing í arbeiðsørindum til og frá ikki vanligum arbeiðsstaði er at rokna sum arbeiðstíð. Hendan skal tó í mest møguligan mun liggja í vanligari arbeiðstíð. Ferðing millum kl. 22.00 og kl. 08.00 verður ikki íroknað, um starvsmaður fær ávíst og goldið seingjarpláss.

Stk. 3. Tá ið dagrøktari er á tænastuferð í Føroyum, kann gisting á gistingarhúsi verða endurrindað móti rokning.

**§ 10 Aðrar skipanartreytir**
Stk. 1. Viðvíkjandi teimum dagrøktarum, ið løntir eru eftir hesum sáttmála, verður víst til løgtingslóg nr. 13 frá 20 mars 1958 um rættarviðurskifti arbeiðsgevara og starvsmanna millum.

**§ 11 Onnur viðurskifti**
Stk. 1. Arbeiðsviðurskifti, sum ikki eru greitt fastløgd í hesum sáttmála, verða at fastleggja við avtalu millum dagrøktara og avvarðandi kommunu.

**§ 12 Serligar avtalur**
Stk. 1. Avtala um serstaka fríviku, og avtalurnar um førleikamenning- og starvsfólkapolitikk á kommunalum stovnum  er eisini galdandi fyri hendan sáttmála.

## 2. Kapittul. Arbeiðstíð og løn

**§ 13 Arbeiðstíð**
Stk. 1. Arbeiðstíðin er í mesta lagi 48 tímar um vikuna, soleiðis at dagliga arbeiðstíðin skal liggja millum kl. 07.30 á morgni og 17.15 á kvøldi. Tó kann einki einstakt barn verða í dagrøktini í longri enn 9 tímar hvønn dag.

Stk. 2. Børn, sum eru í dagrøkt, hava fastar tíðir, sum er fyrrapart, seinnapart ella allan dagin.

**§ 14 løn**
Stk. 1. Dagrøktarar eru mánaðarløntir, soleiðis at byrjunarlønin fyri fulla starvstíð er í 1. lønarflokki á stig 1.
Tann 1. Januar 2022 hækka mánaðarlønirnar 1,25%.
Tann 1. Oktober 2022 hækka mánaðarlønirnar við 740,00 kr.
Tann 1. oktober 2023 hækka mánaðarlønirnar við 2,75%.

Stk. 2. Hvørt barn í dagrøktarskipanini, sum er yngri enn 3 ár, telur við 25% av mánaðarlønini, og børn eldri enn 3 ár telja við 20%.

Stk. 3. Teir dagrøktarar, sum hava færri enn 4 børn í dagrøkt (teirra egnu børn ikki íroknað), verða mettir at verða parttíðarsettir, og lønin verður tá 75% av lønini sambært lønartalvuni fyri viðkomandi lønarstig.
Stk. 4. Um ein dagrøktari hevur 3 børn undir 2 ár í ansing, telja børnini við 33,3 % av mánaðarlønini.

Stk. 5.Um so er, at samlaða talið av børnum í eini dagrøktarskipan, ella í einum parti av eini dagrøktarskipan er lægri enn 12, kann kommunan avtala við dagrøktara, at lønin verður ásett lutfalsliga eftir talinum av børnum, sum viðkomandi hevur í dagrøkt, tó soleiðis at lønin ongantíð kann vera lægri enn 50% av skalalønini á lønartalvuni fyri viðkomandi dagrøktara.

Stk. 6. Í teimum førum har serlig viðurskifti eru galdandi, ella at dagrøktari ikki ynskir at hava fleiri enn 1 – 3 børn í dagrøkt, verður lønin roknað út, soleiðis sum ásett er í hesi grein, stk. 2.

Stk. 7. Fyri børn, sum part av degnum eru í dagrøkt, verður lønin hjá dagrøktara sett í lutfalli til hesa tíð, sum barnið er í dagrøktarheiminum, tó soleiðis at roknað verður bert við hálvum og heilum døgum.

Stk. 8. Kommunur skulu miða eftir, at dagrøktarar, sum ynskja tað, fáa minst 4 børn í dagrøkt.

Stk. 9. Um barnatalið hjá dagrøktara verður lækkað, uttan at dagrøktarin sjálvur hevur søkt um hetta, so skal dagrøktarin tó framvegis hava løn fyri upprunaliga barnatal sítt 1 mánaða at rokna til ein 1. í einum mánaði frá tí, at fráboðanin er komin, at barnatalið er lækkað.

Stk. 10. Ein triðingur av lønini verður goldin sum samsýning fyri slit av heimi, leikur og til ábit hjá dagrøktarbørnunum, og verður hesin partur tí ikki skattaður.

Stk. 11. Starvsaldur verður roknaður hvørt ár. Lønin við øktum starvsaldri er sum víst á hjáløgdu lønartalvu.

Stk. 12. Av skattskyldugu lønini verður goldið 15 % í eftirlønargjaldi til lívstrygging og eftirlønarskipanina hjá Starvsmannafelagnum.

Stk. 13. Lønin verður goldin síðst í mánaðinum afturút sambært lønarseðli, sum dagrøktarin fyllir út fyri hvørt barn sær, soleiðis at foreldur ella verjar eisini skulu vátta rættleikan av hesum arbeiðsseðli.

Stk. 14. Eingi frádráttur verður gjørdur í lønini fyri frídagar, sum nevndir eru í grein 18.

**§ 15 Gestarøkt**
Stk. 1. Kommunan kann áleggja dagrøktarnum, ið hava eina samanseting av børnum, sum gevur eitt ansingarprosent, sum er minni enn útgoldna lønin, at taka onnur børn í ansing, svarandi til lønina áljóðandi 100% ella 75%, uttan eyka kostnað fyri kommununa.

Stk. 2. Samsýning fyri 5 gestarøktir í einum 8 viku tíðarskeiði er íroknað lønini hjá einum fulltíðarløntum dagrøktara. Treytin fyri allari gestarøkt er, at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 5 børn. Hevur dagrøktari 4 børn undir 3 ár í ansing, kann hesin bert taka 1 barn undir 3 ár í gestarøkt. Fyri parttíðarløntar dagrøktarar er sama regla galdandi, tó so at samlaða barnatalið ongantíð fer upp um 4 børn. Gjørt verður upp fyri 8 vikur í senn.

Stk. 3. Um talið av børnum í gestarøkt hjá einum dagrøktara í einum 8 viku tíðarskeiði fer upp um ásetingarnar í stk. 2, so verður goldin upphædd, sum verður roknað lutfalsliga í mun til lønina hjá viðkomandi dagrøktara.

Stk. 4. Ansing av børnum í spælistovu verður bert roknað sum gestarøkt, um samlaða barnatalið í spælistovuni svarar til meira enn 6 børn fyri hvønn fulltíðarløntan dagrøktara/starvsfólk og 5 børn fyri hvønn parttíðarløntan dagrøktara/starvsfólk, sum hendan dagin eru til arbeiðis í spælistovuni.
Samsýningin verður býtt millum teir dagrøktarar, sum hendan dagin eru til arbeiðis í spælistovuni. Samsýningin verður roknað út sambært áseting í § 14, stk.2.

Stk. 5. Eftirløn verður ikki goldin av samsýning fyri gestarøkt, sum gongur út yvir 100% ansing.

**§ 16 Børn við serligum tørvi**
Stk. 1. Áðrenn børn við serligum tørvi koma í dagrøkt, skal avtala gerast við dagrøktara, kommununa og játtandi myndugleikan um samsýning fyri røkt av hesum barni.

Stk. 2. Hugtakið "serligur tørvur" verður í hvørjum einstøkum føri staðfest av játtandi myndugleikanum. Víst verður til § 5 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, við seinni broytingum.

**§ 17 Legugjald**
Stk. 1. Fyri teir tímar, sum liggja uttanfyri vanliga arbeiðstíð, fáa dagrøktarar eina upphædd á 25 kr. um tíman.

**§ 18 Yvirarbeiði**
Stk. 1. Álagt arbeiði út yvir dagliga planlagda arbeiðið hjá fulltíðarsettum dagrøktarum, so sum fundir eftir vanliga arbeiðstíð verður roknað sum yvirarbeiði. Hetta skal roknast út sum 1/2496 av árslønini á 4. stigi.

Stk. 2. Sagt eigur at verða frá fastløgdum yvirarbeiði dagin fyri. Um so er, at dagrøktari ber seg undan, tá ikki er sagt frá dagin fyri, eigur hetta at verða tikið til eftirtektar.

Stk. 3. Verður dagrøktari eftir arbeiðstíð kallaður aftur til arbeiðis, verður samsýnt við 1 yvirtíma eyka.

Stk. 4. Yvirarbeiði verður gjørt upp í byrjaðum hálvum tímum hvønn dagin.

Stk. 5. Fyri 1., 2. og 3. yvirtíman verður samsýnt við 50% av vanligu tímalønini.

Stk. 6. Fyri 4. og fylgjandi yvirtíman og fyri yvirtímar leygardag, sunnudag, halgidag og fastan frídag verður samsýnt við100% av vanligu tímalønini.

**§ 19 Fastir frídagar**
Stk. 1. Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagur, ólavsøkudagur og allir halgidagar eru heilir frídagar. Grundlógardagur og ólavsøkuaftan eru hálvir frídagar, t.e. eftir kl. 12.

Stk. 2. Verður arbeitt í ásettu frítíð, verður goldið hægra yvirtíðargjaldið sambært § 18.

**§ 20 Gjald ella avspákan**
Stk. 1. Uppspardir tímar og áløgd yvirtíð verða givnir sum gjald ella sum avspákan. Er ikki avspákað innan 3 mánaðir og er ikki avtala um avspákan gjørd, verður goldið út.

Stk. 2. Millum dagrøktara og arbeiðsgevara verður avtalað, hvussu yvirarbeiði og meirarbeiði verður avspákað. Verður tilrættisløgd avspákan tikin aftur, skal hetta kunngerast í seinasta lagi 72 tímar, áðrenn farið verður undir arbeiðið, sum liggur beint undan, at farið verður undir frídagar. Er ikki fráboðað rættstundis, skal tíðin samsýnast sum yvirtíð.

**§ 21 Samsýning fyri skeiðluttøku**
Stk. 1. Fyri skeið, sum arbeiðsgevarin áleggur dagrøktara at luttaka á, verður hvør einstakur skeiðdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 9,6 tímar. Um skeið liggur á

degi, har dagrøktari longu hevur arbeitt tímanormin, verður skeiðtíðin tald við í skyldigu arbeiðstíðina, tó við hægst 4 eykatímum út yvir dagtímanormin. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi eftir § 19, verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina, kr. 37,40 eyka um tíman.

Stk. 2. Fyri skeið, sum liggja uttanfyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann kommunan lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku.

Stk. 3. Ferðing til skeið, sum liggja aðrastaðni enn vanliga arbeiðsstaðið (uttanbíggja og í útlondum), verður roknað í skeiðstíðina.

Stk. 4. Ásetingarnar í stk. 1 – 3 kunna við avtalu millum dagrøktara og avvarðandi kommunu frávíkjast, men ger tílík avtala, at kommunan verður stillað verri arbeiðsliga ella kostnaðarliga, skal Fíggjarmálaráðið góðkenna hana.

**§ 22 Frí við ongari løn**
Stk. 1. Tá ið dagrøktari fær tænastufrí við ongari løn, verður gjørdur lønarfrádráttur.
a) Tá ið dagrøktari er burtur heilar mánaðir, verða mótroknaðar heilar mánaðarlønir.
b) Tá ið dagrøktari er burtur vikur, dagar ella tímar, verður mótroknað fyri teir tímar, dagrøktari undir vanligum umstøðum hevði verið til arbeiðis hetta tíðarskeiðið. Ein tími verður roknaður sum árslønin býtt við 2496 (48*52).

**§ 23 Gildi sáttmálans**
Stk. 1. Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2021. Báðir partar kunna siga sáttmálan upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2024. Í samband við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin ikki krevja, at samráðingar um nýggjan sáttmála byrja fyrr enn, 6 mánaðir áðrenn verandi sáttmáli fer úr gildi.

**Í Tórshavn tann 13. Januar 2022**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Pauli Trond Petersen, sign.
Per Martin Gregersen, sign.
Anita Fuglø, sign.

**Starvsfelagið**

Súni Selfoss, sign./Anna Johannesen, sign.
Noomi K. Rasmussen, sign.
Hilmar Augustinussen, sign.
Birita F. Kjærbæk, sign.
Borgný Mohr, sign.

.